# Advokatfelagið við Strond 4 Í/F

TORMÓÐUR DJURHUUS
advokatur
JÓGVAN P. LASSEN
advokatur
PETUR EVEN DJURHUUS
advokatur
JÓGVAN E. ELLEFSEN
advokatur
ANNA DAM
advokatur
INGI HØJGAARD
advokatur
GUNN ELLEFSEN
**advokatur**

Fremlagt i Østre
Landsret

den 1 JUNI 2010

J.nr. 520902

**Stevning**

Sum advokatur fyri

Martu á Lakjuni
Sevdalsvegur 12
530 Fuglafjørður

stevnir undirritaði við hesum

Dan Klein, blaðstjóra
Lýðarsvegur 19
100 Tórshavn

Til at møta saksøktur í niðanfyri nevnda sakarmáli, ið hervið verður latið Føroya rætti, á tingstaði C. Pløyensgøta 1 í Tórshavn. Ynskir saksøkti at mótmæla sakarkravi saksøkjarans, skal hann taka til orða skrivliga í hesum rættarmáli og annars fylgja leiðbeiningini frá Føroya rætti, sum fylgir við stevningini, tá ið kunngjørt verður fyri saksøkta.

<u>Sakarkrav</u>:

Saksøkti verður dømdur stórst møguliga revsing eftir revsilógini § 264 d.

Somuleiðis verður saksøkti dømdur at rinda endurgjald samsvarandi endurgjaldsábyrgdarlógini § 26 ikki undir kr. 50.000,-, umframt sakarkostnað.

Sakarevni:

Á "spísiseðli" fyri Oyggjatíðindi 27/1-2009 verður ein Sex Gøla í Fuglafjarðar skúla umrødd, har nevnt verður, at "øll vita hvør lá á lakinum"

Inni í blaðnum frá 28/1-2009 verða viðurskifti av sera privatum slag umrødd, har saksøkjarinnan verður nevnd "frillan" og at hon er dóttur ein persón, sum ikki varð settur í starv sum skúlastjóri í Fuglafirði, tá ið Suni í Hjøllum fekk hetta starv.

Eisini er ein illa kávað mynd av saksøkjarinnuni á baksíðuni á blaðnum.

Umrøðan í blaðnum er um sera privat viðurskifti, sum eru vard av revsilógini § 264 d.

Málið sprettir ivaleyst frá tí støðu, at ein skúlastjóri er sagdur upp / farin frá í Fuglafjarðar skúla, og letur blaðið seg ivaleyst brúka í eini herferð fyri ein frákoyrdan skúlastjóra og fremur á henda hátt brot á "privatlivets fred".

Ført verður fram, at innihaldið í blaðnum og "spísiseðilin" er brot á revsilógina § 264 d.

Kravt verður endurgjald sambært § 26 í endurgjaldsábyrgdarlógini.

Gjørt skal somuleiðis verða vart við, at blaðstjórin, áðrenn blaðið kom í sølubúðirnar, bleiv gjørdur varugur við, at fyrivarni varð tikið um at reisa hetta mál, men hóast hetta, valdi hann at lata sum einki og prenta greinina.

Víst verður til viðløgdu skjøl:

Skjal 1 – Spísiseðil Oyggjatíðindi tann 27. januar 2009
\- 2 – Oyggjatíðindi nr. 7 frá 28. januar 2009

Tórshavn, tann 16/2-2009

Jógvan P. Lassen, adv.

TORMÓÐUR DJURHUUS
advokatur
JÓGVAN P. LASSEN
advokatur
PETUR EVEN DJURHUUS
advokatur
JÓGVAN E. ELLEFSEN
advokatur
ANNA DAM
advokatur
INGI HØJGAARD
advokatur
GUNN ELLEFSEN
advokatur

Fremlagt i Østre
Landsret
den 01 JUNI 2010

J.nr. 520902

**Stevning**

Sum advokatur fyri

Petur Páll Mikkelsen
við Matará
513 Syðrugøta

stevnir undirritaði við hesum

Dan Klein, blaðstjóra
Lýðarsvegur 19
100 Tórshavn

Til at møta saksøktur í niðanfyri nevnda sakarmáli, ið hervið verður latið Føroya rætti, á tingstaði C. Pløyensgøta 1 í Tórshavn. Ynskir saksøkti at mótmæla sakarkravi saksøkjarans, skal hann taka til orða skrivliga í hesum rættarmáli og annars fylgja leiðbeiningini frá Føroya rætti, sum fylgir við stevningini, tá ið kunngjørt verður fyri saksøkta.

Sakarkrav:

Saksøkti verður dømdur stórst møguliga revsing eftir revsilógini § 264d.

Somuleiðis verður saksøkti dømdur at rinda endurgjald samsvarandi endurgjaldsábyrgdarlógini § 26 ikki undir kr. 50.000,-, umframt sakarkostnað.

Sakarevni:

Á "spísiseðil" fyri Oyggjatíðindi til 27. januar 2009 var stór uppsett grein um sexgølu í Fuglafjarðar skúla og í blaðnum – skjal 2 – frá 28. januar 2009 verða sokallaði viðurskifti hjá saksøkjaranum, sum eru sera privat, umrødd á ein ljótan og niðursetandi hátt, bæði við teksti, mynd og fullum navni.

Málið sprettir ivaleyst frá tí støðu, at ein skúlastjóri er sagdur upp / farin frá í Fuglafjarðar skúla, og letur blaðið seg ivaleyst brúka í hesum máli og roynir á henda hátt at gera seg inn á saksøkjaran.

Talan er sostatt um, at blaðið í eini herferð fyri ein frákoyrdan skúlastjóra, fremur brot á "privatlivets fred".

Ført verður fram, at innihaldið í blaðnum og "spísiseðilin" er brot á revsilógina § 264d.

Kravt verður endurgjald samsvarandi § 26 í endurgjaldsábyrgdarlógini.

Gjørt skal somuleiðis verða vart við, at blaðstjórin, áðrenn blaðið kom í sølubúðirnar, bleiv gjørdur varugur við, at fyrivarni var tikið um at reisa hetta mál, men hóast hetta, valdi hann at lata sum einki og prenta greinina.

Víst verður til viðløgdu skjøl:

Skjal 1 – Spísiseðil Oyggjatíðindi tann 27. januar 2009
- 2 – Oyggjatíðindi nr. 7 frá 28. januar 2009

Tórshavn, tann 4/2 - 2009

Jógvan P. Lassen, adv.

Advokatfelagið við Strond 4

TORMÓÐUR DJURHUUS
advokatur
JÓGVAN P. LASSEN
advokatur
PETUR EVEN DJURHUUS
advokatur
JÓGVAN E. ELLEFSEN
advokatur
ANNA DAM
advokatur
INGI HØJGAARD
advokatur

Framlagt í
FØROYA RÆTTI
22 FEB. 2005

J.nr. 310502

Fremlagt i Østre
Landsrets 5. afd.
den -5 DEC. 2005

**Stevning**

Undirritaði

Jógvan Páll Lassen, advokatur
Skotarók 10
100 Tórshavn

stevnir við hesum

Dan Klein
Lýðarsvegur 19
Box 3312
188 Hoyvík

til at møta saksøktur í niðanfyri nevnda sakarmáli, ið hevst í Føroya rætti á tingstaði í J.H. Schrøtersgøtu 11 í Tórshavn tann dag og tíma, sum rætturin setur á hesa stevning, har saksøkti verður at taka til orða munnliga/skrivliga í hesum sakarmáli og herumframt verður at leggja fram tey skjøl, hann til styðja seg við.

**Sakarkrav**:

Saksøkti verður dømdur fyri útspilling, sambært revsilógina § 268, í øðrum lagi fyri ærumeiðing, sambært revsilógina §267.

Somuleiðis verða fylgjandi brot frá internet Oyggjatíðindunum frá 13. januar 2005 dømd deyð at vera:

- "KLIENT FUPPARI"
- "Kom peningurin inn á klient-kontoina, so hevði Reyði Krossur einki fingið. Tað sigi eg av beiskum royndum."
- "at tað var heppið, at gjalda peningin beinleiðis til Reyða Kross, tí annars metir hann ikki at ein króna hevði farið til neyðhjálpina í Asiu"
- "Bergur sigur, at hann fyri árum síðani brúkti Jógvan Páll Lassen at innkrevja pening fyri seg: Men advokaturin valdi at stjala peningin. Hann avroknaði so ongantíð, sjálvt um eg fekk vissu fyri, at skuldarin hevði goldið alt inn til advokatin"

Úr Oyggjatíðindum 14. januar 2005:

- "KLIENT FUPPARI"
- "Kom peningurin inn á klient-kontoina, so hevði Reyði Krossur einki fingið. Tað sigi eg av beiskum royndum."
- "Bergur Wardum avdúkar"
- "Hann sigur at tað var heppið at gjalda peningin beinleiðis til Reyða Kross, tí annars metir hann ikki at ein króna hevði farið til neyðhjálpina í Asiu. Bergur sigur at hann fyri árum síðani brúkti Jógvan Páll Lassen at innkrevja pening fyri seg: Men advokaturin valdi at stjala peningin."
- "Hann avroknaði so ongantíð, sjálvt um eg fekk vissu fyri, at skuldarin hevði goldið alt inn til advokatin"
- "at bestalningurin hjá honum, líkist mest einum kaprarapappírið"
- "og ger nýtslu av triðja persóni, fyri at ríka seg og síni"
- "Í hansara verð eksisterar ikki hugtakið svindil. Hjá honum er tað bara ein arbeiðsrissiko, at verða tikin við fingrunum í kakudósini."

- "Maðurin er djúpt kriminellur"
- "Jógvan Páll Lassen er klientsvindlari"

Saksøkti verður eisini kravdur dømdur at rinda endurgjald kr. 60.000,- við rentu frá stevningsdegi, umframt kostnaðin av hesum rættarmáli.

<u>Sakarevni</u>:

Í Oyggjatíðindum, sum saksøkti er ábyrgdarblaðstjóri á, frá 5. januar 2005, varð stórt uppsett grein "Lover Boy" við mynd av innlendismálaráðharranum Jógvani við Keldu og var ein lítið tespulig grein á allari síðu 3 í hesum sambandi.

Landsstýrismaðurin vendi sær til undirritaða sum advokat at taka sær av málinum, vísandi til, at hann metti seg ærumeiddan, og at einki hald yvirhøvur var í hesum tíðindum, sí skjal 1. og 2.

Undirritaði vendi sær síðani til Dan Klein við skrivi, dagf. 5. januar 2005 – skjal 3 – við avsannan – skjal 4 – og kravdi m.a., at blaðstjórin, fyri at sleppa undan at verða stevndur í hesum máli skuldi rinda kr. 10.000,- til Reyðakross í sambandi við Tsunami- vanlukkuna í Asien.

Tað vísti seg eisini, at einki hald var í tí, sum blaðið hevði skrivað, og varð umberingin til Jógvan við Keldu prentað í blaðnum nakrar dagar seinri, og skrivaði undirritaði aftur til Dan Klein – sí skjal 5 - og bað um váttan fyri, at tær kr. 10.000,- vóru goldnar, og svaraði hann í skrivi, dagf. 11. januar 2005 at so var.

Á heimasíðuni hjá Oyggjatíðindum 13. januar 2005 - sí skjal 6 - verður undirritaði avmyndaður á allari forsíðuni og kallaður "KLIENT FUPPARI" og verður endurgivið, útsagn frá Bergi Wardum "at tað var heppið at gjalda peningin beinleiðis til Reyða Kross, tí annars metir hann ikki, at ein króna hevði farið til neyðhjálpina í Asiu. Bergur sigur, at hann fyri árum síðani brúkti Jógvan Páll Lassen at innkrevja pening fyri seg: Men advokaturin valdi at stjala peningin. Hann avroknaði so ongantíð, sjálvt um eg fekk vissu fyri, at skuldarin hevði goldið alt inn til advokatin, sigur Bergur Wardum. Meira í blaðnum fríggjadagin..."
Í blaðnum fríggjadagin 14. januar 2005 er á forsíðuni mynd av undirritaða saman við Bergi Wardum, har undirritaði verður kallaður "KLIENT FUPPARI" og niðanfyri verður prentað, at "Bergur Wardum avdúkar."

Á baksíðuni er stórt uppsett greint, har útspillingin frá internet-Oyggjatíðindunum verður endurtikin, har m.a. verður sagt "men advokaturin valdi at stjala peningin" og "at bestalningurin hjá honum líkist meira einum kaprarapappírið" "og ger nýtslu av triðjapersóni, fyri at ríka seg og síni" "Í han-

sara verð eksisterar ikki hugtakið svindil. Hjá honum er tað bert ein arbeiðsrissiko at verða tikin við fingrunum í kakudósini".

Eisini verður borið fram, at "maðurin er djúpt kriminellur".

Greinin endar við at "Jógvan Páll Lassen er klientsvindlari".

Gjørt verður galdandi, at talan er um útspilling, sambært revsilógini § 268, sum sett er fram móti betri vitandi, og hevur saksøkti onga grund havt til at framseta hesi og enn minni í almennum tíðarriti við egnum vinningi fyri eyga at útbreiða hesi.

Víst verður til hesi skjøl:

Skjal 1– Oyggjatíðindi 5. januar 2005 forsíða
- 2 – Oyggjatíðindi 5. januar 2005 síða 3
- 3 – Skriv frá Advokatfelagnum við Strond 4 frá 5. januar 2005
- 4 – Avsannan
- 5 – Skriv frá Advokatfelagnum við Strond 4 frá 11. januar 2005
- 6 – Skriv frá Dan Klein frá 11. januar 2005
- 7 – Internet Oyggjatíðindi 13. januar 2005
- 8 – Internet Oyggjatíðindi 13. januar 2005
- 9 – Oyggjatíðindi 14. januar 2005 forsíðan
- 10 – Oyggjatíðindi 14. januar 2005 baksíðan

Tórshavn, 18. januar 2005

Jógvan P. Lassen, adv.